AKSTOVAN

# Frálæruætlan

Fyri R/F-skeið

**1. oktober 2009**

# 0. INNGANGUR

Yvirskipaða málið við koyriútbúgvingini, í sambandi við at fólk skulu endurvinna sær koyrirættin, er at geva skeiðsnæminginum**:**

- innlit og fatan av teimum kropsligu og sálarligu viðurskiftunum, sum hava við rúsdrekka og ferðslu at gera.
- størri og víðkaðan kunnleika til mørkini fyri rúsdrekkanýtslu í samband við ferðslu.
- størri tilvitan um vágan í ferðsluni, so at teir á ein tryggari hátt kunnu koyra akfarið við neyðugum fyriliti fyri øðrum.

Tað er fatanin hjá myndugleikunum, at rúsdrekka og ferðsla als ikki hoyra saman. Í broytingini í ferðulógini í 2000 og 2009, eru tikin stig til eina røð av tiltøkum fyri at herða átøkini móti rúsdrekkakoyring. Millum annað skal vera tvungin undirvísing um rúsdrekka og ferðslu í sambandi við, at fólk skulu afturvinna sær koyrirættindi aftan á treytaða og treytaleysa frádøming av koyrirættinum orsakað av rúsdrekkakoyring. Henda frálæra – ***skeið í rúsdrekka og ferðslu*** (R/F-SKEIÐ) – skal síggjast í einum størri høpi saman við øðrum tiltøkum, sum t.d. at rúsdrekkamarkið varð sett niður frá 0,5 til 0,2 og skerpaða revsing fyri rúsdrekkakoyring.

Rúsdrekka og ferðsla er ein vandamikil blanding.Tað er almennur kunnleiki, at henda samanblanding kann vera revsiverd, antin tí at fólk hava hægri promillu, enn loyvda markið er, ella ikki eru før fyri at føra akfarið á tryggan hátt.

Við at ***viðurkenna*** heldur enn at avnokta, at rúsdrekkakoyring er ein ***veruleiki*** í samfelagnum, ger tað týdningarmiklari, og enn meira viðkomandi at leggja aðra ætlan fyri, hvussu vit á besta hátt kunnu forða fyri afturfalli (recidiv – afturfalli til rúsdrekkakoyring), heldur enn at prenta í skeiðsluttakarnar, at tað er vandamikið og revsivert.

Henda valda ætlan miðar eftir at fáa skeiðsluttakararnar at minka um sína samlaðu rúsdrekkanýtslu.

Endamálið við frálæruni er heilt greitt, at teir við frálæruni skulu gerast so tilvitaðir um vandan og vágarnar við rúsdrekka og rúsdrekkakoyring, at tað skal ávirka teir til at minka um sína rúsdrekkanýtslu/misnýtslu.

Harumframt verður miðað eftir í frálæruni um rúsdrekka og ferðslu, at læra luttakararnar aðrar strategiir í sambandi við tær óhepnu avleiðingarnar at blanda saman hesar báðar handlingar.

## 0.1 Innihaldið í frálæruætlanini

Henda frálæruætlan hevur eina útgreining av innihaldinum í frálæruni og hvussu tað er býtt sundur í høvuðspartar og deilpartar.

Hvør høvuðspartur byrjar við einari stuttari lýsing av endamálinum við frálæruni. Síðan kemur eitt uppbýti í undirpartar við høvuðsmálum og útgreinaðum deilmálum.
Í deilmálunum verða leiðreglur lýstar fyri frálæruna. Her verður meira ítøkiliga lýst, hvat skeiðsluttakarin skal vita og duga, tá ið frálæran er liðug.

## 0.2 Førleikakrøv

Fyri meira ítøkiliga at lýsa førleikakrøvini, verða í undirvísingartilfarinum brúkt hesi hugtøk í deilmálslýsingini.

**Skeiðsluttakarin skal:**

- ***"Gerast kunnugur við"***. Hetta merkir, at skeiðsluttakarin á eini glæru ella við sjónvørpu skal gerast kunnugur við evnið ella viðurskiftini, sum tilfarið í hesum skeiði umfatar.

- ***"Hava kunnleika til".*** Hetta merkir, at skeiðsluttakarin skal vera kunnaður um evnið ella viðurskifti á ein slíkan hátt, at hetta ikki er honum ókent.

- ***"Hava fatan av".*** Hetta merkir, at skeiðsluttakarin skal kunna skilja týdningin av evninum ella viðurskiftunum.

## 0.3 Innihaldið í frálæruni

### ***Høvuðsmál***

Fráleran skal venda sær til allar skeiðsluttakararnar. Av tí at skeiðsluttakararnir hava ymiskar fortreytir, er neyðugt at tillaga undirvísingarháttin og innihaldið í samsvar við henda veruleika.

### ***Deilmál***

### 0.3.1 Frálæruháttur

Tað er upp til undirvísaran at velja frálæruháttin, men er tað av størsta týdningi, at allir luttakararnir í størsta mun verða tiknir við í frálæruna.

Skeiðið er grundað á, at skeiðsluttakararnir skulu:

- **Undirvísast**
- **Upplýsast og**
- **Kunnast um tey mest viðkomandi evnini.**

***Skeiðið skal ikki bera brá av viðgerð!***

### 0.3.2 Háttarbundna grundstøðið

RF-skeiðið er bygt upp um tær grundreglur í sálarfrøðini, sum hava hesar føstu partar:

- Ítøkilig vitanarflyting, har upplýsingar um og frálæra í ein givnum evni, sum hevur víst seg at geva persónligar trupuleikar fyri eitt menniskja ella fyri umhvørvið.

- Minking av sjúkdómseyðkendum atburði, tað merkir at økja um møguleikan fyri at síggja og meta um egin átøk í mun til trupulleikarnar!

- Innlæring av nýggjum átøkum fyri trupulleikaloysnir. Tað merkir at økja um møguleikan fyri at eyðmerkja- ***gerast tilvitaður*** – og kjakast um møguleikar fyri at seta inn annan – ***gagnligari***- atburð enn tann, sum persónurin er vanur at brúka.

- Gera nýtsu av stuðulsbólkum. Tað merkir  at geva teimum møguleikan fyri at uppliva atburðarmøguleikarnar hjá øðrum menniskjum og at umhugsa og grunda um egnar gerðir og hugburð.

Grundleggjandi frálæra í sálarfrøði hevur verið brúkt á økjum, har menniskju hava havt tørv á at bróta við verandi vanar og atburð, sum hevur verið ógagnligur fyri tey sjálvi og teirra umhvørvi. Tað er staðfest, at um hesi menniskju, á nevndu økjum, við frálæru, upplýsing, kunning og venjing, fáa tilført viðkomandi upplýsingar og høvi at menna tær til sína egnu vitan, so ber til at broyta

hugburð og harvið menna nýggjar mannagongdir fyri, hvussu tey skulu bera seg at og harvið tilogna sær ein nýggjan – gagnligari atburð í mun til trupulleikarnar.

Nevnda frálæra hevur víst seg at vera virkin og gagnlig t.d. til avvarðandi hjá sinnisveikum og rúsevnismisnýtarum. Eisini hava ***”Lívsstílssamrøður”*** um rúsdrekkanýtslu, sum eisini er grundað á somu frálæru í grundleggjandi sálarfrøði, víst seg at føra við sær eina munandi minking av sjúkueyðkennunum, t.e. eina skerjing í rúsdrekkanýtsluni.

Tað er við bakstøði í hesum frálæruhættum, at hetta RF-skeið er bygt upp og frálæruni av ástøðiligari vitan um:

- Alment um rúsdrekka, og hvussu rúsdrekka ávirkar menniskju kropsliga, sálarliga, kensluliga, andaliga, sosialt, etiskt og moralskt.

- Um rúsdrekkanýtslu, bæði søguliga, menturnarliga og um tær likamligu, sálarligu og sosialu orsøkirnar til, at fólk drekka.

- Rúsdrekkanýtslu og hvat tað er, sum ger/kann gera, at nýtsla kann mennast til misnýtslu.

- Fyriskipan, forðingartiltøk í samband við kropsligar, sálarligar, sosialar trupulleikar í ferðsluni av rúsdrekkaávum.

Fyri at gera næmingin enn meira tilvitaðan um sína egnu rúsdrekkanýtslu, er í frálærutilfarinum eitt oyðiblað, har næmingurin kann skráseta sína rúsdrekkanýtslu.

Her skal gerast vart við, at tað er upp til hvønn einstakan næming, um hann vil nýta hetta oyðublaðið, og at tað eisini er í lagi ikki at fylla út hetta oyðublað. Samstundis skal gerast vart við, at hetta oyðublað kann brúkast sum eitt upplegg til kjak, um næmingurin sjálvur ynskir tað.

Lærarin skal vera tilvitaður um, at talan er um frálæru og ikki um viðgerð. Um ein næmingur á skeiðnum ger vart við, at hann hevur rúsevnistrupulleikar, ber til at vísa honum verandi viðgerðarstovnar.

### 0.3.3 Framferðarháttur

Tað er týdningarmikið, at lærarin er greiður yvir, at tað kunnu vera ymisk tilelvingarstig hjá næmingunum. Orsøkin til hetta er m.a., at frálæran er kravd, men er hetta eisini ein spegilsmynd av ymisku fortreytunum hjá næmingunum.

Miðað verður eftir, at innihaldið í frálæruni hjá ymisku lærarunum er so eins sum til ber. Tí er gjørt eitt frálærutilfar til hvørja undirvísingareind, sum lærarin skal brúka. Tað er sjálvandi upp til hvønn einstakan lærara at undirvísa í sínum egna frálæruhátti.

Tó er treytin tann, at hvør undirvísingareind skal innihalda:

- Tá ið undirvísingin byrjar, skulu næmingarnir fáa lagt fram eitt yvirlit yvir innihaldið í serstøku undirvísingareindunum.

- Tá ið ein frálærueind endar, skal lærarin taka saman um megintáttin í tilfarinum.

Harumframt skal strevast fram ímóti at:

- Frálæran – undirvísingin- skal vera opin og í vinaligum anda.
- Frálæran skal í størsta mun stevna móti, at næmingarnir ***aktivt*** kunnu tilogna sær frálærutilfarið, t.d. við at leggja upp til, at luttakararnir brúka egnar royndir í undirvísingini.

Niðanfyri er innihaldið í undirvísingini lýst. Lærarin skal vera greiður yvir, at fleiri av deilmálunum fyri einstøku frálærueindirnar er orðað í høvuðsheitum, og at roknað verður við, at lærarin sjálvur útgreinar, samanber og grundar viðkomandi undirvísingartilfar.

## 03.04 Frálærukreftir

Frálæran kann bert fremjast við einum lærara, sum hevur fingið serligt innlit í hesa frálæruætlan. Hetta ber við sær, at fyri at hava heimild til at undirvísa, skal lærarin hava fingið góðkenda undirvísing og ***staðið prógv í RF-skeiðum frá Akstovuni***.

# 1. Frálærueind

Endamálið við innihaldinum í 1. frálærueindini er at geva næminginum kunnleika um bakgrundina fyri undirvísingini og innihaldinum í RF-skeiðinum og reglurnar fyri at luttaka í skeiðnum.

Eisini hevur undirvísingin til endamáls at gera skeiðsluttakaran kunnugan við almennu viðurskiftini um rúsdrekkakoyring og avleiðingarnar av hesum.

Eisini hevur undirvísingin til endamáls at gera næmingin kunnugan við ásetingarnar í lógini um rúsdrekkakoyring.

## *1.1 Skeið í rúsdrekka og ferðslu*

## ***<u>Høvuðsmál</u>***

Skeiðsluttakarin skal gerast kunnugur við treytirnar fyri, hvussu hann á nøktandi hátt kann fremja hetta skeiðið.

## ***<u>Deilmál</u>***

### 1.1.1 Endamálið við skeiðnum

Skeiðsluttakarin skal greitt fáa at vita, at endamalið við skeiðnum um rúsdrekka og ferðslu er at ávirka skeiðsluttakaran á ein slíkan hátt, at hann framyvir heldur seg frá rúsdrekkakoyring.

### 1.1.2 Skeiðslýsing

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika til:

- at skeiðið verður boðið út av góðkendum koyrilærarum í samstarvi við Akstovuna, sum hevur yvirskipaðu ábyrgdina av frálæruætlanini.
- Undirvísarar eru serliga góðkendir koyrilærarar.
- Skeiðið er sett saman av 4 pørtum – ***frálærueindum*** - har hvør parturin er 2½ tíma til longdar, býtt yvir 4 vikur, tilsamans 10 tímar

### 1.1.3 Møtiskylda v.m.

Skeiðsluttakarin skal hava skilt hesi viðurskifti og reglur:

- Undirvíst verður í bólkum, sum næmingurin skal fylgja alt skeiðið.
- Møtiskylda er til allar 4 frálærueindirnar.
- Um næmingurin ikki møtir til allar frálærueindirnar, skal hann byrja av nýggjum.
- Næmingurin skal møta, áðrenn undirvísingin byrjar, og skal vera virkin í undirvísingini.
- Næmingurin má ikki møta ávirkaður av nøkrum rúsandi ella doyvandi evnum.
- Skeiðsleiðarin hevur heimild at útihýsa næmingum, ið ikki halda møtiskylduna.

- Í serligum førum, t.d. um næmingurin kann skjalprógva, at hann hevur verið sjúkur, er møguleiki fyri at kunna fullføra útbúgvingina á einum skeiði, sum byrjar seinni.

### 1.1.4 Skeiðssáttmáli

Næmingurin skal hava skilt fylgjandi viðurskifti og reglur:

- Fyri at sleppa at luttaka, skal skeiðsluttakarin undirskriva ein bindandi sáttmála, har hann váttar, at hann er sinnaður at fullføra skeiðið og fylgja teimum reglum, sum eru galdandi fyri at luttaka á skeiðnum.

## 1.2 Alment um rúsdrekkakoyring

## ***<u>Høvuðsmál</u>***

Næmingurin skal hava neyðugu vitanina um almenn viðurskifti í sambandi við at koyra ávirkaður av rúsdrekka.

## ***<u>Deilmál</u>***

### 1.2.1 Hvør koyrir rúsdrekkaávirkaður

Næmingurin skal gerast kunnugur við niðanfyrinevndu hagtøl:

- Rúsdrekkadómar býttir á aldur, kyn, starv, útbúgving og hjúnarstøðu.
- Ferðsluóhapp

### 1.2.2 Leysasøgur og veruleiki

Næmingurin skal gerast kunnugur við leysasøgur- mytur- og veruleikan viðvíkjandi rúsdrekkakoyring:

- **Leysasøgan** sigur, at tað bert eru ávísir bólkar í samfelagnum, sum koyra ávirkaðir. **Veruleikin** er, at tey, sum koyra ávirkað, koma úr øllum stættum og starvsbólkum í samfelagnum. Talið av ungum, yngri enn 25 ár, sum eru dømd fyri rúsdrekkakoyring í Danmark seinastu 10 árini, er minkað niður í eina helvt.

- **Leysasøgan** sigur, at teir, sum verða tiknir fyri rúsdrekkakoyring, vanliga verða tiknir aftan á, at teir hava verið í veitslu, t.d. jóladøgurðar, og tað at koyra ávirkaður bara er eitt fyribrigdi, sum hendir ta einu ferðina!
  **Veruleikin** er, at nógv av teimum, sum verða tikin fyri rúsdrekkakoyring, hava rúsdrekkatrupulleikar. Dagliga koyrir ein hópur av fólki ávirkaður av rúsdrekka.

- Tað eru fleiri fatanir av, hvussu løgreglan varnast tey í ferðsluni, sum koyra ávirkað av rúsdrekka, m.a. er ein av l**eysasøgunum**, at løgreglan serliga hevur eyguni eftir handverkarum fríggjadagar, tá ið arbeiðsdagurin endar, ella at løgreglan hevur eitt ávíst tal av rúsdrekkaávirkaðum førarum, sum teir skulu fanga. **Veruleikin** er, at tey, sum koyra ávirkað, oftast verða funnin í sambandi við ferðslukanningar, tá ið tey koyra ov skjótt, vísa jánkasliga koyring ella í sambandi við, at tey gerast partur av einum ferðsluóhappi.

- Ein onnur **leysasøga** er, at tey, sum koyra rúsdrekkaávirkað, eru ein týðandi partur av fíggjarligu inntøkuni hjá løgregluni. **Veruleikin** er, at bøtur fara beinleiðis til statskassan, og at tað kostar løgregluni bæði tíð og pengar m.a. at taka blóðroyndir.

- Fleiri ferðandi halda, at tey kunnu snýta alkometrið, sum løgreglan brúkar. Eitt nú við at eta sterk bomm, tyggigummi, hvítleyk ella brúka munnsprei. **Veruleikin** er, at flestu løgreglufólkini hava fleiri ára royndir í at avdúka tey, sum koyra rúsdrekkakoyring, líkamikið hvørjar snildir tey brúka.

### 1.2.3. Avleiðingar av at koyra rúsdrekkaávirkaður

Næmingurin skal fáa eina framløgu av:

- At nógvar fíggjarligar, sosialar, kensluligar og løgfrøðiligar avleiðingar standast av rúsdrekkakoyring.

- Samfelagið brúkar hvørt ár hópin av peningi í samband við rúsdrekkakoyring.

- Rúsdrekkakoyring ber við sær, at fleiri fakfólk verða boðsend, íroknað løgreglu, læknar rættarkemikarar og dómarar.

- Harumframt verða til summi ferðsluóhapp, har rúsdrekkakoyring er orsøkin, eisini innkallað t.d. sjúkrabilar, bjargingarfólk, sjúkrasystrar, mótpartar, vitni, fólk á staðnum, tryggingarfólk o.o.

- Tá ið óhapp bera við sær deyða, verða eisini prestar og onnur, sum fyrireika jarðarferðir, partur av málinum.

- Avvarðandi hjá rúsdrekkaføraranum verða eisini ávirkað sálarliga (hetta verður neyvari útgreinað í 1.parti av 2. undirvísingareind).

- Tryggingarfeløgini afturgjalda ikki allar útreiðslurnar fyri skaðarnar, ið fólk hava gjørt við vilja – tilætlað- ella við stórum gáloysni. T.d. verður rúsdrekkakoyring mett sum stórt gáloysni. Harumframt hava summi tryggingarfeløg undantaksavgerðir í tryggingar-treytunum, sum siga, at um rúsdrekkakoyring er atvoldin til óhappið, tekur tryggingin ikki við.

Hesi viðurskifti bera við sær, at ein rúsdrekkaførari sjálvur má bera útreiðslurnar og ábyrgdast fyri skaðar á onnur fólk, sum hann er atvoldin til.

### 1.2.4 Lógarásetingar um rúsdrekkakoyring

Skeiðsluttakarin skal hava fatað fylgjandi lógarreglur:

- Líkamikið hvør rúsdrekkapromillan er, verður førarin sektaður, um hann ikki á ein tryggan hátt kann føra akfarið.

- Við eini promillu millum 0,2 og 0,5 er sektin fyrstu ferð bót, svarandi til eina netto mánaðarløn faldað við promillustøddini, tó ongantíð lægri enn 5.000 kr og treytað

frádøming av koyrirættinum. Um hetta endurtekur seg, gerst bótin hægri. Endurtekur hetta seg aftur, verður viðkomandi dømdur varðhaldsrevsing.

- Er promillan millum 0,5 og 2.0, er revsingin fyrstu ferð ein bót, svarandi til eina netto mánaðarløn faldað við promillustøddini og treytaleys frádøming av koyrirættinum.

- Revsingarskipanin í sambandi við rúsdrekkakoyring er soleiðis, at revsingin veður herd, tá ið brotið verður endurtikið. Tað sama er galdandi við koyring undir herdum umstøðum.

- Tað er ikki loyvt at lata eitt akfar til ein persón, sum hevur drukkið so mikið av rúsdrekka, at viðkomandi ikki á ein tryggan hátt er førur fyri at føra akfarið.

- Løgreglan kann til eina og hvørja tíð krevja útandingarroynd av føraranum á einum motordrivnum akfari.

- Revsingin við hægri promillum (treytaðir dómar við treytum um rúsdrekkaviðgerð, ella samfelagstænastu ella treytaleysari fongsulsstraff upp til 1½ ára fongsul)

- Við hvørt er møguleiki fyri at fáa koyrikortið aftur fyrr enn ásett, um viðkomandi fer í viðgerð fyri sínar rúsevnistrupulleikar.

- Um tann, sum hevur fingið frádømt koyrikortið kortini koyrir, verður hann í førinum fyrstu ferð sektaður við bót, svarandi til eina netto mánaðarløn. Endurtekur hetta seg, kann revsingin verða fonglsul upp í 1 ár. Endurtøkur av hesum broti gevur løgregluni rætt til at leggja hald á akfarið.

## 2. Frálærueind

Endamálið við hesum parti er at geva næminginum kunnleika til ta skaðligu ávirkan, rúsdrekka hevur á persónin og tey nærmastu, avvarðandi og umhvørvið. Her verður eisini givin frálæra um vanar og misnýtslu, eisaini tiltøk móti rúsdrekkanýtsluni.

Endamálið við frálæruni er eisini at kunna um rúsdrekka og ferðslu.

### *2.1. Hvussu rúsdrekka ávirkar fólk*

## ***<u>Høvuðsmál</u>***

Skeiðsluttakarin skal hava eina vitan um, hvussu rúsdrekka ávirkar persónsmenskuna, umhvørvið og evnini – førleikan – til trygt at ferðast í ferðsluni.

Skeiðsluttakarin skal hava vitan um kropsligu, sálarligu og sosialu avleiðingarnar, lutvíst av rúsdrekkanýtslu, men eisini av rúsdrekkamisnýtslu.

## ***<u>Deilmál</u>***

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika um, hvussu rúsdrekka ávirkar likamligu og sálarligu heilsuna:

- Rúsdrekka ávirkar hvørja einastu kyknu í likaminum, og kann, um tað verður misbrúkt, elva til skaðar í vevnaði og gøgnum.

- Um rúsdrekkanýtslan er stór í longri tíð, er vandi fyri, at hetta ávirkar kostvanarnar og kann tí elva til eitt nú vitamintrot.

- Tað er ein sannroynd, at rúsdrekka kann økja um negativu avleiðingarnar av kensluligum støðum, sum t.d. strongd og angist. Tí er rúsdrekka ikki ein góð loysn til slíkar trupulleikar.

- Tá ið tú drekkur rúsdrekka, broytist eisini kensluliga støðan, og er grundreglan, at tann kensluliga støðan, tú hevur, áðrenn tú byrjar at drekka, verður styrkt, men eisini, at tú sum frá líður kanst broyta persónsmensku.

- Metingarevnini verða eisini munandi skerd, tá ið tú drekkur rúsdrekka. Hetta er ein av høvuðstrupulleikunum í sambandi við rúsdrekka og ferðslu.

### 2.1.2. Familjan/netverkið

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika um, hvussu rúsevni ávirka viðurskiftini við onnur menniskju:

- Rúsdrekka og onnur rúsevni ávirka viðurskiftini millum menniskju. Hetta **kann** vera positivt. T.d. kann ein vælkomudrykkur gera hýrin betri á fólki. Tað kann eisini hava eina negativa ávirkan, av tí at tað doyvir sansirnar, so at tú ikki varnast og gáar um tað, sum hevur týdning, t.d. tørvin hjá tínum børnum.

- Ein stór rúsdrekkanýtsla kann vera viðvirkandi og beinleiðis orsøk til ringan trivna hjá teimum avvarðandi. Serliga hjá hjúnarfelaga og børnum.

- Ein stór rúsdrekkanýtsla ávirkar eisini familjulívið sum heild, og kann tí ávirka trivnaðin hjá tí einstaka familjuliminum.

- Avvarðandi, íroknað vinir og keningar hjá teimum, sum drekka ov mikið, kunnu eisini líða og tí fáa ymiskar álvarsamar bakbrestir.

### 2.1.3. Starvs- og fíggjarviðurskifti

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika um teir privatfíggjarligu partarnar - og avleiðingarnar av rúsevnanýtsluni:

- Ein stór rúsdrekkanýtsla er hjá teimum flestu ein fíggjarlig byrða og vil tí ofta elva til sakn og avleiðingar á øðrum týdningarmiklum økjum.

- Ein stór rúsdrekkanýtsla kann verða ein so stór fíggjarlig byrða hjá familjuni, at hon fær avleiðingar fyri vælferðina hjá tí einstaka í familjuni.

- Ein stór rúsdrekkanýtsla er ein hóttan fyri almenna arbeiðsumhvørvið og trygdina á arbeiðsplássinum.

- Rúsdrekkanýtsla kann og vil, um nýtslan er ov stór, hava ávirkan á starvsviðurskifti. Hetta er galdandi við atliti til starvsfelagar, meiri sjúkrafráveru, vanda fyri ávaring og uppsøgn.

- Ein stór rúsdrekkanýtsla/misnýtsla kann í ringasta føri elva til fíggjarligan og harvið sosialan ruðuleika.

## 2.2. Rúsdrekkanýtsla

### Høvuðsmál

Skeiðsluttakarin skal hava vitan um, hvussu tú roknar rúsdrekkapromillu og niðurbróting av rúsdrekka í kroppinum.

### Deilmál

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika til fylgjandi viðurskifti:

- Støddin á glasinum kann vanliga javnmetast við nøgdina av rúsdrekka
- Promillunøgdin kann mátast, bæði í útandingarluftini og við blóðroynd.
- Promillan kann roknast matematiskt, hóast hesar útrokningar ikki altíð eru eftirfarandi.
- Um tú í longi tíð hevur eina stóra rúsdrekkanýtsu, so vil kroppurin og heilin venjast/tillagast til rúsdrekka. Avleiðingin kann gerast, at tú verður bundin. Eisini hevur hetta við sær, at tú mást taka størri nøgdir av rúsdrekka fyri at merkja sama virkning/rús.
- Kvinnur og eldri fólk hava minni vøddamongd enn yngri menn, og mangla eisini eitt enzym í maganum til at brenna burtur rúsdrekka. Hetta merkir, at hesi – við somu nøgd av rúsdrekka – fáa ein størri rús enn yngri menn.
- Kvinnur eru í størri vanda fyri at gerast bundnar av rúsdrekka.
- Sansir og gøgn ávirkast, tá ið tú drekkur rúsdrekka. Í hvønn mun hetta hendir, er treytað av promillunøgdini, men er eisini ymiskt hjá hvørjum einstøkum. Alment kann sigast, at tú missir eitt sindur av tamarhaldinum við 0,3 – 0,5 promillu, samskipanarevnini verða niðursett og reaktiónstíðin økist við 0,8 promillu, møðin økist við 1,0 promillu og talan/hoyrnin/sjónin ávirkast við 2,0 promillum.
- Niðurbrótingin av rúsdrekka – brenningin – er í størsta mun í livrini. Ferðin í niðurbrótingini er treytað av m.a. støddini av livrini og kropsvektini.
- Niðurbrótingarferðin í livrini er støðug. Tað er tí bara tíðin, sum er avgerðandi fyri, hvussu skjótt rúsdrekkað fer úr kroppinum.
- Tað finnast nógvar lygusøgur um, hvussu tú kanst økja um niðurbrótingina av rúsdrekka, t.d. við at drekka kaffi, fylla magan, sova ella fáa sær brúsubað. Hetta eru bert lygusøgur, tí evnisbroytingin, og harvið niðurbrótingin av rúsdrekka, lagar seg eftir tí einstaka og kann ikki broytast av nøkrum uttanífrá.

## *2.3. Vánaligir vanar og misnýtsla*

### ***Høvuðsmál***

Skeiðsluttakarin skal hava vitan um munin millum rúsdrekkanýtslu og rúsdrekkamisnýtslu!

### ***Deilmál***

### 2.3.1 Menningin av og tekin upp á rúsdrekkatrupulleikar.

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika til teir faktorar, sum kunnu elva til rúsdrekkamisnýtslu:

- Rúsdrekka er ein løgur, sum er lutfalsliga lættur at fáa fatur á, og er hetta viðvirkandi orsøk til, at tað so lættliga kann elva til misnýtslu.

- Tað finnast ymiskir likamligir, sálarligir og sosialir mátar at eyðmerkja rúsdrekkamisnýtslu og rúsdrekkatrupulleikar.

- Rúsdrekkamisnýtslan mennist oftast spakuliga frá vanligari nýtslu til ovurnýtslu og síðan til misnýtslu. Hetta er vanliga yvir eitt longri tíðarskeið. Tí er tað torført hjá einum persóni sjálvur at gerast tilvitaður um í góðari/rættari tíð, at so er.

- At viðurkenna ein rúsdrekkatrupulleika er altíð torført. Tí er tað eisini torført at viðgera rúsdrekkatrupulleikar.

- Likamligu og sálarligu eyðkennini av rúsdrekkamisnýtslu eru løtt at staðfesta og skulu takast í størsta álvara.

- Eyðkennini upp á rúsdrekkatrupulleikar eru ikki avmarkaði til rúsdrekkamisnýtaran sjálvan, men kunnu eisini merkjast á trivnaðinum hjá teimum avvarðandi, serliga hjá hjúnarfelaga og børnum.

- Rúsdrekkatrupulleikar eru vanliga eitt dulsmál í okkara mentan. Tí fær ein rúsdrekkamisnýtari ofta alt ov langan enda og kann tí skaða bæði seg og tey avvarðandi og samfelagið sum heild.

- Rúsdrekkatrupulleikar kunnu mennast sum ”sekunder” fylgja av øðrum misbrúki, ella sum fylgja av vantandi viðgerð av likamligari og sálarligari pínu ella sjúku.

### 2.3.2 Vandabólkar

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika um ymisk viðurskifti, sum kunnu vera viðvirkandi orsøkir til, at ein kann vera í einum vandabólki fyri at menna eina rúsdrekkamisnýtslu:

- Um rúsdrekka verður brúkt til at loysa trupulleikar, so er størri vandi fyri, at hetta kann mennast til eitt misbrúk.
- Rúsdrekka kann, um tað verður brúkt til pínudoyving ella til at taka burtur annað stikni, fáa tær avleiðingar fyri persónin, at hann mennir sína nýtslu til ein rúsdrekkatrupulleika ella rúsdrekkamisnýtslu.
- Rúsdrekka kann, um tað verður brúkt til at taka burtur ótespiligar kenslur, gera, at persónurin kemur í vandabólkin við teimum avleiðingum, at rúsdrekkanýtslan kann mennast til rúsdrekkatrupulleikar og rúsdrekkamisnýtslu.
- Tær sosialu hendingarar, sum kunnu raka eitthvørt menniskja, kunnu eisini vera við til at nýtslan mennist til misnýtslu.

## *2.4 Tryggir rúsdrekkavanar*

## ***<u>Høvuðsmál</u>***

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika til strategiir í mun til rúsdrekkanýtslu og - misnýtslu, t.e. hvussu tú hevur tamarhald á tíni rúsdrekkanýtslu.

## ***<u>Deilmál</u>***

### 2.4.1 Strategiir við atliti til rúsdrekkanýtslu

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika um strategiir, sum forða fyri, at ein rúsdrekkanýtsla mennist til eina misnýtslu:

- Tú skalt hava tamarhald á tíni rúsdrekkanýtslu, t.d. við at skráseta tína nýtslu, leggja til rættis tína rúsdrekkanýtslu og hava tamarhald á drekkingini.
- Hvørja ferð tú drekkur rúsdrekka, skalt tú gera tær greitt, hví tú drekkur í hesi støðuni. Á henda hátt kanst tú forða fyri eini vanadrekking og soleiðis avmarka rúsdrekkanýtsluna til serlig høvi.
- Tú kanst eisini lata vera at drekka hvønn dag, halda rúsfrí tíðarskeið, lata vera at drekka í einingi og ikki drekka, tá ið tú hevur trupulleikar.
- Skeiðsluttakarin skal fáa útflýggjað eitt oyðiblað, har hann kann skráseta sína rúsdrekkanýtslu.

## 2.5. Rúsdrekka og ferðsla

## Høvuðsmál

Skeiðsluttakarin skal vita, at rúsdrekka ávirkar sansirnar soleiðis, at tað at ferðast í ferðsluni kann gerast vandamikið fyri persónin sjálvan og fyri umhvørvið.

## Deilmál

### 2.5.1 Hví skalt tú ikki koyra, tá ið tú hevur drukkið?

Skeiðsluttakarin skal gerast kunnugur um fylgjandi grundgevingar fyri ikki at koyra, tá ið hann hevur drukkið:

- Rúsdrekka ávirkar evnini og førleikan at føra eitt akfar á tryggan hátt. M.a. miðsavningarevnini og metingarevnini verða munandi avmarkað. Avgerðartilgongdin er tvørligari og tekur longri tíð. Samstundis eru evnini at hava yvirlit yvir torgreiddar ferðslustøður niðursett, somuleiðis evnini at meta rætt um ferð og frástøður. Rúsdrekka ávirkar eisini nervalagið soleiðis, at afturbragdsevnini vikna og verða seinførari.

- Tað er samband millum promilluna, og hvussu rúsdrekkað ávirkar kroppin. T.d. tá ið ein drekkur, verða evnini beinanvegin niðursett. Longu við 0,5 promillu eru evnini munandi niðursett at fata støðuna, og til samstundis at seta í verk nágreinligar, skjótar og rættar rørslur. Eisini ávirkar rúsdrekka sjónarvinkulin, sum minkar.

- Tað er greitt samband millum promilluna og vágan fyri óhappi. Vágin fyri óhappi er tvífaldur við alkoholpromillu upp á 0,5. Við 0,8‰ er vandin trífaldaður, og við 1,5‰ er vágin tíggjufaldaður og við 2,0 ‰ tjúgufaldaður.

# 3. Undirvísingareind

Endamálið við innihaldinum í 3. undirvísingareindini er at geva skeiðsluttakarunum kunnleika um viðurskifti og støður, har tað er serligur vandi fyri at koyra ávirkaður, og gera skeiðsluttakararnar kunnugar við orsøkir til rúsdrekkamisnýtslu og teir viðgerðarmøguleikar, sum standa teimum í boði.

Eisini skulu skeiðsluttakararnir fáa kunnleika um fyribyrgjandi átøk móti strongd og leiðbeiningar, sum kunnu forða fyri, at teir fara at koyra, tá ið teir hava drukkið.

## *3.1 Orsøkir til rúsdrekkanýtslu og -misnýtslu*

## ***<u>Høvuðsmál</u>***

Skeiðsluttakarin skal kunnast um, hvørjar orsøkir kunnu elva til rúsdrekkanýtslu og misnýtslu.

Skeiðsluttakarin skal eisini kunnast um søguligu, mentanarligu, likamligu, sálarligu og sosialu orsøkirnar, sum liggja til grund fyri rúsdrekkanýtslu og misnýtslu, og hvussu tú kanst handfara strongd og viðgerð av rúsdrekkamisnýtslu.

## ***<u>Deilmál</u>***

### 3.1.1 Hví drekka fólk?

Skeiðsluttakarin skal fáa kunnleika um tær mongu og fleirtáttaðu orsøkirnar, sum kunnu liggja til grund fyri, at fólk drekka, t.e.bæði positivu og negativu síðurnar av rúsdrekkanýtsluni:

- Tann søguliga, mentanarliga og tær symbolsku og siðbundnu orsøkirnar til, at fólk drekka, hevur stóra ávirkan á m.a. títtleikan og í hvørjum umstøðum, tú drekkur.

- Rúsdrekka verður nógv brúkt í dag, har fólk koma saman. Hetta merkir, at tað í okkara mentan ofta eru høvi, har fólk smakka sær á. Hetta ber eisini við sær, at tað, líkamikið um tú ert bundin ella ikki, er torført ikki at koma sær í støður, har rúsdrekka verður bjóðað.

- Rúsdrekka kann virka doyvandi, tá ið vit kenna andstygd, og økir um vælverukensluna, tá ið vit kenna okkum væl. Hetta eru tvær tær týdningarmiklastu orsøkirnar til, at fólk nýta rúsdrekka í so stórum nøgdum.

- Samspælið millum eginleikarnar hjá rúsdrekka og stóru útbreiðsluna førir við sær, at øll, ið smakka sær á, tá ið samanum kemur, eru í vanda fyri at menna teirra nýtslu til eina misnýtslu.

- Tekin um at fólk eru bundin og trupulleikarnir av misnýtsluni í teimum ymisku stigunum.

## *3.2 Støður við serliga stórum váða í sambandi við rúsdrekka og ferðslu.*

## ***Høvuðsmál***

Skeiðsluttakarin skal kenna til ferðslutrupulleikarnar, sum kunnu koma í sambandi við rúsdrekkakoyring. Skeiðsluttakarin skal eisini hava eina vitan um tær støður, ið innibera stóru váðarnar, um koyrt verður, meðan tú ert ávirkaður. Tí skal næmingurin eggjast til at brúka tær tríggjar meginreglurnar.

## ***Deilmál***

### 3.2.1 Støður, ið eru serliga vandamiklar, tá ið tú koyrir ávirkaður av rúsdrekka

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika til tað trýst, sum kann koma, bæði innan- og uttanífrá, til at koyra rúsdrekkakoyring:

Mentanarligir hugburðir og leysasøgur um rúsdrekkakoyring, kunnu ávirka fólk til at koyra rúsdrekkakoyring. T.d. siga summi, ” at royndir bilførarar megna at koyra, hóast teir hava drukkið”, ”Vaksin fólk kunnu betri stýra rúsinum”, ”rúsdrekkakoyring er eitt privatmál og nakað, ein sjálvur hevur ábyrgdina av”, og ” Vit skulu ikki blanda okkum í, hvat onnur drekka.”

Tað trýstið, sum kann vera millum kenningar, kann fáa tey flestu at gera eitthvørt, sum tey undir øðrum umstøðum høvdu hildið verið skeivur atburður.

Sjálvskenslan og vantandi sjálvsálit kann vera ein orsøk til, at fólk velja at koyra rúsdrekkakoyring.

Evnini til at meta um sína egnu støðu viknar munandi, tá ið tú ert ávirkaður av rúsdrekka. Tí kann tað eisini vera torført at halda avtalur um ikki at koyra ávirkaður.

Vit mæla til, at tú leggur ítøkiligar ætlanir fyri tína rúsdrekkanýtslu í vandastøðunum og brúkar tær tríggjar meginreglurnar.

## *3.3. Stevnumið og tær tríggjar meginreglurnar hjá førarum*

## ***Høvuðsmál***

Skeiðsluttakarin skal kenna til tær tilgongdir og fyriskipanir, ein kann taka fyri ikki at koma í eina tvístøðu um rúsdrekkakoyring og kunnleikan til tær tríggjar meginreglurnar, og hervið verða eggjaður til ikki aftur at koyra ávirkaður.

## ***Deilmál***

### 3.1.1 Tær 3 meginreglurnar hjá førarum

Skeiðsluttakarin skal hava skilt tær 3 meginreglurnar. Tað er neyðugt at velja eina av reglunum, áðrenn tú smakkar tær á, og harvið taka tey neyðugu verjutiltøkini, so at tú kanst liva upp til týdningin av tínum vali.

Regla nr. 1 **"Eg drekki, men koyri ikki"**

Regla nr. 2. **"Eg koyri, men drekki ikki"**

Regla nr. 3. **"Um eg kortini drekki og koyri, so haldi eg meg niðan fyri rúsdrekkamarkið".**

Í sambandi við at brúka hesar tríggjar meginreglur, skal skeiðsluttakarin hava skilt hesi viðurskifti:

- Tá ið tit fara í býin, ger so eina avtalu um, hvør skal koyra bilin heim.
- Legg eina ætlan fyri, hvussu nógv, ið skal drekkast.
- Tel, hvussu nógvar lítlar, tú drekkur.
- Drekk vatn millum annaðhvørt glas.
- Gist, har veitslan er.
- Lat bilin standa heima.
- Tak ein hýruvogn ella annan almennan flutning
- Gev onkrum øðrum billyklarnar.

## *3.4 Tilgongdir í sambandi við kenslur, strongd og rúsdrekka*

### ***<u>Høvuðsmál</u>***

Skeiðsluttakarin skal kunnast um tilgongdir, sum kunnu tálma faktorum sum strongd, og kenslum, sum kunnu vera atvoldin til rúsdrekkamisnýtslu.

### ***<u>Deilmál</u>***

### 3.4.1. Hvussu tú kanst handfara strongd og kenslur

Skeiðsluttakarin skal gerast kunnugur við fylgjandi viðurskifti:
Sambandið millum ”Osøk – reaktión – handling”.

Líkamikið hvat ið hendir tær í lívinum (orsøk), eru reaktiónirnar og handlingarnar eyðkendar fyri tann einstaka persónin, og kunnu tí broytast. T.d. kann strongd upplivast sum nakað jaligt við tað at tú t.d. kanst læra at arbeiða meira mundadygt. Tú kanst læra at siga frá – seta mørk – heldur enn at drekka.

At tað ber til at læra seg ikki at reagera óhóskandi við at broyta, hvussu tú reagerar t.d. við at fáa innlit í tínar kenslur. Um tú ert kunnugur við orsøkirnar til tínar kensluligu reaktiónir, so ber til at taka henda atburð burtur, broyta ella at sleppa sær undan at koma í hesar støður.

## *3.5 Tá ið strategiirnar ikki eru nóg mikið*

## ***Høvuðsmál***

Skeiðsluttakarin skal kunnast um tey ókeypis tilboðini, sum eru til ráðgeving, vegleiðing, stuðul og viðgerð, um ein hevur ein rúsdrekkatrupulleika.

## ***Deilmál***

### 3.5.1 Viðgerðarmøguleikar

Næmingarnir skulu kunnast um hesar viðgerðarmøguleikar:

Tað eru ymisk viðgerðartilboð og møguleikar, sum í høvuðsheitum eru tilboð um einstaklingaviðtalur, vegleiðing og viðgerð. Hetta er ikki bara galdandi fyri tey, sum hava eina stóra rúsdrekkanýtslu ella misnýtslu, men eisini fyri tey avvarðandi.

Mest vanligu viðgerðarhættirnir í almennu viðgerðartilboðunum eru innlegging á Heilbrigdið ella Bláa Kross. Á hesum stovnum ber eisini til at fáa einstaklingasamtalur hjá einum rúsdrekkaráðgeva ella hjá sálarfrøðingi. Harumframt eru bólkafundir kring landið, sum eru lýstir í vikubløðunum.

# 4. Undirvísingareind

Endamálið við hesum parti er at geva skeiðsluttakarunum kunnleika um treytirnar fyri at innstillast til nýggja eftiransandi koyriroynd og fáa koyrikortið aftur og gera skeiðsluttakararnar kunnugar við tær týdningarmestu lógarásetingarnar um koyrikort.

Skeiðsluttakarin skal harumframt gerast kunnugur við tey krøv, sum sett verða við koyriroyndina, íroknað møguleikan fyri at skula taka nýggja koyrifrálæru hjá einum koyrilærara, áðrenn hann skal upp til koyriroynd.

## *4.1. Treytir fyri at endurvinna koyrirættindini*

## ***<u>Høvuðsmál</u>***

Skeiðsluttakarin skal kunnast um tær týdningarmiklastu lógarásetingarnar um at endurvinna sær koyrirættindini, umsókn um koyrikort og tær neyðugu váttanirnar. o.a.

## ***<u>Deilmál</u>***

### 4.1.1 Koyrifrálæran v.m.

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika til fylgjandi lógarásetingar og viðurskifti:

Áðrenn farið verður upp til eftiransandi koyriroynd, skal næmingurin hava gjøgnumført eitt skeið um rúsdrekka og ferðslu, eitt sokallað RF-skeið.

Áðrenn farið verður upp til eftiransandi koyriroynd, tá ið førarin hevur fingið frádømt koyrirættin, skal skeiðsluttakarin hava gjøgnumført eina serliga koyriundirvísing.

### 4.1.2 Tilmæli um eftiransandi koyriroynd

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika um fylgjandi lógarásetingar:

- Koyrikortið verður útskrivað av Akstovuni, eftir at tey hava staðið koyriroyndina.
- Tann eftiransandi koyriroyndin skal takast á Akstovuni.
- Tá ið tú verður instillaður til koyriroyndina, skal tað gerast við at fylla út og undirskriva eitt serligt oyðublað, sum skal latast inn til skrivstovuna á Akstovuni.
- Saman við umsókníni skal eisini latast inn:
    - Føði-, navna-, ella dópsbræv
    - Vællíknandi fotomynd (andlitsmynd uttan høvuðklæði) stødd 35 x 45 mm
    - Skjalprógv fyri, at tú hevur fullført RF-skeiðið.
- Akstovan kann harumframt krevja læknaváttan, um tað verður mett neyðugt.

## *4.2. Tann eftiransandi koyriroyndin*

## ***<u>Høvuðsmál</u>***

Skeiðsluttakarin skal kunnast um galdandi vegleiðing fyri koyriroyndina og innihaldið, og hvussu hon verður framd.

Tær týdningarmiklastu lógarásetingarnar um at endurvinna sær koyrirættindini, umsókn um koyrikort og tær neyðugu váttanirnar. o.a.

## ***<u>Deilmál</u>***

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika um fylgjandi lógarásetingar:

- Eftiransandi koyriroyndin skal fremjast sum høvuðsregla eftir ásetingunum fyri bólk B (persónbil)

- Til koyriroyndina skal tann serkøni meta, um umsøkjarin hevur tann kunnleika og førleika, sum eru ásettur í lýsingini av deilmálunum í frálæruætlanini fyri viðkomandi koyrikortsbólk.

- Koyriroyndin verður býtt í eina verkliga- og ein ástøðiliga roynd. Ástøðiliga royndin skal verða staðin, áðrenn farast kann upp í verkligu royndini.

### 4.2.2 Ástøðisroyndin

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika um fylgjandi leiðreglur fyri atstøðisroyndina:

- Royndin varar vanliga ½ tíma.

- Royndin er skrivlig og verður framd við at næmingurin fær fyrilagt eitt tilvildarligt úrvæl av góðkendu ljósmyndarøðini hjá Akstovuni við innlisnum spurningum har næmingurin á teldu skal seta kross við rætta svarið.

- Umsøkjari, sum orsakað av serligum viðurskiftum – sum skulu vera skjalprógvað – ikki er førur fyri at greiða vanligu skrivligu royndina, kann ávísast til eina serliga roynd, har tann sakkøni t.d. lesur upp spurningarnar ella støðgar telduni millum hvønn spurning. Ljósmyndarøðin og avkrossing á teldu, skal eisini brúkast til hesa serroynd.

- Royndarhølið skal latast aftur, tá ið  møtitíðin er  komin. Umsøkjarar, sum ikki møta til tíðina og eftir, at royndin er byrjað, fáa ikki atgongd til royndarhølið, og kunnu móti gjaldi fáa ásettan ein nýggjan royndardag.

- Áðrenn royndin byrjar, skulu umsøkjararnir fáa vegleiðing um, hvussu royndin verður gjøgnumførd og allar treytir, íroknað hvussu krossað verður á teldu. Dentur verður lagdur á, at tað ikki er loyvt at brúka nøkur hjálpiamboð.

- Meðan royndin er, hava bert umsøkjararnir og próvdómarin atgongd til royndarhølið.

- Royndin verður mett av próvdómara á Akstovuni.

- Úrslitið av royndini skal kunngerast beinanvegin eftir, at royndin er liðugt mett. Umsøkjarin skal hava upplýst, í hvørjum evnum í undirvisingarætlanini hann hevur svarað skeivt.

- Vi ástøðisroyndina skal umsøkjarin hava við sær:

    - **Umsóknina** við neyðugu upplýsingunum.
    - Persónlig skjalprógv, so sum pass.

## 4.2.3. Tann verkliga royndin

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika til fylgjandi rætningsreglur um verkligu royndina:

- Koyritíðin, sum verður avsett til metingina av atburðinum hjá umsøkjaranum í ferðsluni skal ikki vera styttri enn 25 minuttir við tí verkligu royndini í bólki B.

- Umframt koyritíðina, skal tíð setast av til eyðmerking av umsøkjaranum, upplýsingar um, hvussu royndin hilnaðist, eftirlit av útgerðini í akfarinum, eftirmeting av gongdini í royndini. Royndartíðin kann leingjast, um tað verður mett neyðugt, og kann eisini støðgast, um førleikin hjá umsøkjaranum er ov vánaligur.

- Verkliga royndin skal fremjast við próvdómaranum, sum skal sita við síðuna av umsøkjaranum í einum góðkendum skúlavogni, sum umsøkjarin sjálvur hevur tøkan. Koyrilærarin ella hansara umboðsmaður kann, um umsøkjarin ella próvdómarin ikki mótmæla munandi, vera hjástaddur á baksetrinum.

- Meðan verkliga royndin verður framd, verður umsøkjarin mettur sum førari við tí ábyrgd og teimum treytum og skyldum, sum har fylgja við.

- Sum ein partur av verkligu royndini, verður førleikin hjá umsøkjaranum í at handfara vanligu lógarásettu útgerðina í bilinum eisini mettur. Meðan eftirlitið verður framt, skal umsøkjarin, uttan nøkur hjálpiamboð, eftirkanna og taka støðu til, um teir partar, sum verða kannaðir, uppfylla lógarkrøvini og kunna greiða frá, hvussu eftirlitið verður útint.

- Umsøkjarin skal koyra tær leiðir og fylgja ávísingunum frá tí royndarserkøna. Ávísingarnar skulu verða greiðar og týðiligar, og í so góðari tíð, at umsøkjarin kann fata og skilja tær og náa at fyrireika seg og fremja tað ávísta. Tann royndarserkøni leiðir royndina á ein slíkan hátt, at umsøkjarin ikki verður noyddur út í óvanligar ferðslustøður ella verður eggjaður til at handla móti ferðslureglunum og trygdini annars.

- Tær atgerðir, sum verða ávístar í parti 2 um ”Hvussu tú bert teg at á eini royndarbreyt”, og parti 9 ”Hvussu tú bert teg at á eini koyritekniskari breyt” í undirvísingarætlanini hjá færdselsstyrelsen fyri koyriútbúgvingina til bólk B, skal í verkligu royndini ikki fremjast fyri seg, men vera partur av vanligu handfaringini av bilinum, meðan tú koyrir. Tó skal bakkingin, og bakkingin runt um horn vera ein partur av stakroyndunum, men kann verða kravt, at tað skal gerast rímuliga nágreinligt. Sum dømi skal slalomkoyring í 8-tal frameftir og aftureftir ikki vera til so stóra nágrein.

- Tann sakkøni skal tríva inn í koyringina, um tað av trygdarávum gerst neyðugt.

- Einstakir minni álvarsamir feilir kunnu ikki einsamallir gera, at royndin verður dømd sum ***ikki staðin***, tí at umsøkjarin skal dømast eftir eini heildarmeting.

- Úrslitið av royndini skal beinanvegin kunngerast, so skjótt sum royndin er liðug. Umsøkjararnir, ið ikki hava staðið royndina, skulu kunnast um, hvørji førleikakrøv í frálæruætlanini, teir ikki hava ein nøktandi førleika í.

- Við verkligu royndina skal umsøkjarin hava við sær:
    - Persónlig skjalprógv
    - Galdandi pass, ella
    - Uppruna dóps- og navnaváttan ella føðiváttan.

## *4.3 Lógarásetingar um koyrikort*

## ***<u>Høvuðsmál</u>***

Skeiðsluttakarin skal kunnast um tær týdningarmiklastu lógarásetingarnar viðvíkjandi koyrikortinum.

## ***<u>Deilmál</u>***

### 4.3.1 Gildi hjá koyrikortinum

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika um fylgjandi lógarásetingar:

- Koyrikortið er vanliga galdandi, til tú er fyltur 70 ár, men kann í serligum føri hava gildi í styttri tíðarskeið og eftir serligum ásetingum.
- Tá ið gildistíðin er úti, kann koyrikortið endurnýggjast fyri eina styttri tíð í senn. Hetta kann gerast við at venda sær til Akstovuna.
- Tá ið tit føra motorakfar, skulu tit altíð hava við tykkum koyrikortið, og skal tað vísast til løgregluna, um teir biðja um tað.
- Um skaði kemur á koyrikortið, ella tað blívur burtur, skulu tit venda tykkum til Akstovuna fyri at fáa eitt nýtt.
- Koyrikort má ikki verða givið umsøkjarum, ið ikki eru edrúir ella til umsøkjarar, ið eru bundnir av rúsandi evnum ella øðrum evnum, ið kunnu ávirka tilvitanina, evnini og førleikan at føra eitt motorakfar.

### 4.3.2. Afturtøka av endurtiknum koyrikortum

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika til fylgjandi lógarásetingar:

Um Akstovan hevur grund at halda, at ein bilførari ikki uppfyllir treytirnar fyri at hava koyrikortið longur, kann Akstovan taka koyrikortið aftur ella kalla inn viðkomandi førara til eina eftiransandi koyriroynd.

Er førararætturin frádømdur treytaleyst, kann førararætturin vanliga bert endurvinnast eftir at hava staðið eina eftiransandi koyriroynd.

Um tann eftiransandi koyriroyndin ikki verður staðin í seinasta lagi við triðju koyriroynd, skulu møguligar aðrar koyriroyndir takast eftir reglum um koyriroyndir til teir bólkar, har førarin ynskir at endurvinna koyrirættindini. Tað merkir, at eftiransandi koyriroyndir skulu takast í øllum bólkum, har førarin ynskir at endurvinna.

Um førararætturin hevur verið inndrigin ella frádømdur í meiri enn 3 ár, skal førarin upp til eftiransandi koyriroyndir í øllum bólkunum, sum hann ynskir at endurvinna. T.d. skal ein við koyrikorti, sum er frádømdur at hava rættin at føra persónbil (bólk B), Lastbil (bólk C) og Buss (bólk D) til eftiransandi koyriroynd í øllum bólkunum B,C, og D.

### *4.4 Koyrifrálæra*

## ***Høvuðsmál***

Skeiðsluttakarin skal kunnast um fyrimunirnar við at taka ímóti vanligari koyrifrálæru, áðrenn tann eftiransandi koyriroyndin verður tikin.

## ***Deilmál***

Skeiðsluttakarin skal hava kunnleika til fylgjandi viðurskifti:

Tað er ikki ein treyt fyri at sleppa til eina eftiransandi koyriroynd, at tú áðrenn koyriroyndina skalt hava fingið koyrifrálæru hjá einum góðkendum koyrilærara.

Ein stórur partur av umsøkjarnum, ið ikki hava tikið koyrifrálæru áðrenn eftiransandi koyriroyndina, klára ikki roynd ina. Hetta er orsakað av, at royndartreytir og ferðslureglur eru broyttar seinastu 10 árini, á sama hátt sum umsøkjararnir hava tilognað sær "ringar vanar" (kunningarfeilir, plasering á vegnum, tekngeving v.m.).

Hvussu koyrifrálæran verður løgd til rættis hjá góðkenda koyrilærarnum í sambandi við eina eftiransandi koyriroynd.

Fyri persónar, sum hava fingið frádømt koyrirættin treytaleyst, má koyrivenjing til eftiransandi koyriroyndina í fyrsta lagi byrja 3 mánaðir, áðrenn frádømingin er fyrnað.

## *4.5. Eftirmeting og uppgerð*

### ***Høvuðsmál***

Miðast skal eftir, at skeiðsinnihaldið í størsta mun roynir at fáa skeiðluttakaran at fata skeiðsgongdina. Harumframt skal skeiðið avgreiðast til enda.

### ***Deilmál***

### 4.5.1. Eftirmeting

Skeiðsluttakarin skal, tá ið eftirmetingin verður gjørd, hava møguleika fyri at taka lut við tí fyri eyga, at hann til møgulig seinni skeið skal kunna fáa sum mest burturúr.

### 4.5.2. Prógv fyri at hava staðið RF-skeiðið

Skeiðsluttkarin skal hava útflýgjað eina skeiðsváttan sum skjalprógv fyri at hava gjøgnumgingið RF-skeiðið.